almannastovan

# Stuðul til uppihaldspening

Umsókn um stuðul til uppihaldspening fyri fyrra 2008 hálvár saman við kvittanum fyri goldið barnagjald ella hjúnafelagagjald, skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 03.06.2008. Kvittanir skulu eisini vísa, til hvønn barna- ella hjúnafelagagjaldið er goldið. Um goldið er til TAKS, er ikki neyðugt at lata inn kvittanir.

Umsóknir, sum eru Almannastovuni í hendi innan nevndu freist, verða avgreiddar í juni 2008. Sambært lóg um stuðul til uppihaldspening verður stuðulin útgoldin seinast í juni og desembur og verða umsóknir, sum verða móttiknar aftaná 03.06.2008 ikki avgreiddar fyrr enn í desembur 2008.

Verður søkt fyrstu ferð, skal avrit av gjaldsavgerð um barna- ella hjúnafelagagjald frá Ríkisumboðnum ella samsvarandi útlendskum myndugleika sendast inn saman við umsóknini.

Umsóknarbløð kunnu heintast á heimasíðuni www.almannastovan.fo undir teiginum oyðubløð og fáast við at venda sær til økisdeildirnar.

**Økisdeildin í Tórshavn**
Tinghúsvegur 14
100 Tórshavn
tlf. 35 35 70 – fax 35 35 71

**Økisdeildin í Norðoyggjum**
Klaksvíksvegur 78A
700 Klaksvík
tlf. 45 72 40 – fax 45 72 41

**Økisdeildin í Eysturoy**
Heiðavegur
620 Runavík
tlf. 47 47 10 – fax 47 47 11

**Økisdeildin í Suðuroy**
800 Tvøroyri
tlf. 35 35 60 – fax 35 35 61

# KOYRIKORT?
## EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar hósdagin 29. mai 2008 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 503002 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**

# OV STÓR HÚS??

Tað er kanska strævið hjá tær at halda húsini og tú umhugsar kanska at býta um við eina minni íbúð, sum er nógv bíligari í el og hita og hartil einki viðlíkahald.

Eigur tú, ella tit, eini hús í Havn ella Suður Streymoy, kunnu vit kanska taka eitt prát um, hvussu nógv vit evt. skulu gjalda ímillum.

Vit hava eina góða íbúð á Ternuryggi í Havn, ca. 70 m², stova og køkur í einum og 2 kømur.

Hevur hetta áhuga, vinarliga sendi okkum nakrar reglur.

**Bill. Mrk. 0197**

# Miðnámsskúlanum í Suðuroy

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá **1. august 2008** leyst at søkja

## Eitt starv sum kemilærari.

**Fólk, sum um at vera liðug at lesa, eru eisini vælkomin at søkja.**

Umsøkjarar, ið ikki hava námsfrøðiliga útbúgving, og sum verða settir, skulu í august mánaði taka námsfrøðiligt innleiðsluskeið, sum Mentamálaráðið skipar fyri.

Skúlin fer í tilmæli sínum um setan í fast starv at leggja dent á, at umsøkjararnir hava kunnleika til føroyskt mál og føroysk viðurskifti, og um teir ikki hava tað, at teir eru sinnaðir at ogna sær innlit og vitan um hetta. Umsøkjarar, ið ikki hava kunnleika til føroysk mál og føroysk viðurskifti, kunnu søkja um setan sambært treytunum í 2-ára sáttmála. Hetta merkir, at umsøkjari verður settur í eitt 2 ára tíðaravmarkað starv, og at skúlin rindar flyti- og ferðaútreiðslur aftur og fram millum verandi bústað og Miðnámsskúlan í Suðuroy. Upphæddin til flyti- og ferðaútreiðslur er í mesta lagi 30.000 kr., og er hon skattskyldig. Um viðkomandi seinni ynskir at søkja fast starv við Miðnámsskúlan, verður søkt á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar.

Miðnámsskúlin flytir í nýggj hølir til jóla. Roknað verður við, at lærararnir hjálpa til við innrættingini av hølunum.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um endamál skúlans við at venda sær til leiðslu skúlans ella við at vitja heimasíðu skúlans: www.midnam.fo

Starvssetanin verður sambært sáttmála millum Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF) og Fíggjarmálastýrið. YF-umsóknarbløð fáast frá Yrkisfelagnum ella frá skúlanum (tlf. 373622, faks 374026, e-mail ole@midnam.fo)

Umsóknin skal sendast til Miðnámsskúlan í Suðuroy, att. Ole Laursen, deildarleiðari, 900 Vágur, í seinasta lagi **1. juni 2008.**

# Davidsen ættin í Kvívík

**Leygardagin 14. juni** verður skipað fyri samkomu fyri eftirkomarunum hjá Aggusteinus og Biritu Davidsen í Kvívík í sambandi við, at Bertie Davidson úr Kanada, sum er abbasonur Johan Hendrik Davidsen, kemur á vitjan.

Johan Hendrik flutti til Kanada í 1903 og hevur nógvar eftirkomarar har. Johan Hendrik var giftur við Wilhelminu Petersen av Válinum, dóttir Peter Frederik Johannesen og Angeliku f. Reinert.

Hugnaløta við ábiti verður í Glæmuni í Kvívík **14. juni kl. 12**, har skyldfólk og onnur áhugað eru vælkomin.

Tey, ið hava hug at koma, kunnu tekna seg á teldupostadressuni: davidsenfamiljan@gmail.com ella á telefon 257342 ella 255016 **innan 4. juni.**
**Kostnaður 100 kr**

Áhugað kunnu hyggja á heimasíðuna www.faroeiceland.ca

*Vegna fyrireikarannar*
*Marjun í Gong*

**Leirvíkar kommuna**

## Námsfrøðingur til Barnagarðin á Gásamýri.

Hevur tú hug til at arbeiða í lítlum, hugnaligun barnagarði, so er tað tær, vit leita eftir. Barnagarðurin á Gásamýri er ætlaður 26 børnum í aldrinum 4-6 ár. Eftir ætlan letur nýggjur stovnur upp á sumri 2009

Søkt verður eftir námsfrøðingi, 30 t viku, at byrja **01.08.08** ella eftir nærri avtalu.

Vit ynskja at tú hevur umsorgan fyri børnum. Ert virkin og nýhugsandi. Hevur evni at samstarva við foreldur og starvsfólk, samstundis sum tú kanst arbeiða sjálvstøðugt. At tú vilt vera við til at skapa ein fjøldbroyttan, tryggan og mennandi dag saman við børnunum. Hevur fakliga vitan, ið er við til at menna stovnin, og at tú sært fyrimunir framum vansar.

Vit eru ein stovnur í menning og kunnu bjóða tær eitt áhugavert og spennandi starv, saman við fittum og virknum børnum og góðum starvsfelagum. Har tú ert við til at mynda tað dagliga arbeiðið og gerandisdagin hjá børnunum og har tú hevur ávirkan.

**Setanartreytir.**
Starvið er lønt á lønastig 11-18 , eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Sigvør Gregersen , leiðara á tlf 743325
Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera stovninum í hendi innan **11. juni 2008**

**Leirvíkar Kommuna**
**Kulibakki 15**
**Postrúm 42**
**FO-520 Leirvík**

Sosialurin
www.sosialurin.fo



# Japanskir spíðshundar

Vit trý eru 6 vikur. Um 2-3 vikur kunnu vit flyta heimanífrá. Vit hava góðkenda DKK ættartalvu. Sum fullvaksnir koma vit at viga 6-8 kg. Okkara foreldur eru fyrimyndarliga fitt og barnavinarlig.

**Ring og hoyr nærri.**
**310736 / 510736**